Vit trúgva, at Guds ætlan er, at kristnu foreldrini eiga at vera tey fyrstu og fremstu, ið upplæra børn síni um sexualitetin. Fyrsti lærdómurin er tann sterkasti; hví bíða, til barn títt hoyrir tað skeiva og síðan royna at rætta misskiljingarnar? Sexualiteturin er ein vøkur gáva; hví ikki bera hana fram fyri børnini soleiðis, sum Gud ætlaði hana? Hví ikki leggja eina grund, við tær sjálvum sum tann álítandi serfrøðingurin, ið børn tíni kunnu venda sær til fyri at fáa greiðu á Guds sannleikum um sexualitetin?

Bókarøðin *Guds ætlan við sex* hjálpir foreldrum at mynda persónleikan hjá børnunum, serliga á sexuella økinum. Sexuallæra í familjuni fevnir meira um, at mynda moralska persónleikan hjá barninum, heldur enn at geva biologiskar upplýsingar.

Hvussu ung kunnu stýra sexualitetinum í tannárunum og aftaná er eitt úrslit av fimm høvuðsøkjum í menningini, sum her skulu nevnast. Jú fyrr vit byrja at hjálpa børnunum sjálvum at síggja seg og sín sexualitet, sum Gud sær tey, jú sterkari verða tey, tá ið tey koma inn í tey turbulentu tannárini.

Her er eitt áhugavert stutt brot á enskum um bókarøðina:

https://youtu.be/k9sDRutGLd8

# Guðs ætlan við sex - bókarøðin




**Henda verkætlanin hevur snúð seg um at geva kristnum foreldrum tilfar, soleiðis at tað gerst lættari at tosa við børnini um kynsleiklutir og kynslív út frá einum sunnum grundarlagi.**

Umleið 20 fólk úr ymiskum kirkjum og samkomum í Føroyum hava arbeitt í 2 ár við at týða eina bókarøð, ið eitur *God's design for sex.* Ein bólkur av føroyskum prestum/pastorum hevur eftirhugt og viðmælir tilfarið, m.a. tí tað er skrivað av fakfólki og byggir á bíbilska læru um hjúnalag, familju og samlív.

Bøkurnar læra børnini/tey ungu m.a.:

· at vit eru skapt sum maður og kvinna

· um sunnar kynsleiklutir

· at Gud ætlar, at sex skal hoyra hjúnalagnum til millum eina kvinnu og ein mann

· at ongin eigur at gera seg inn á børnini kynsliga

· at tað er skeivt at fremja fosturtøku

· at porno er skeivt

Ein hoyrir um ymisku evnini á hóskandi aldursstigi.

Bókarøðin hevur fýra bøkur til børn/ung í aldrunum 4-6, 6-9, 9-12 og 12-16 ár og eina foreldrabók. Tær fyrstu tríggjar bøkurnar eru týddar til føroyskt og síðan nýta vit í Føroyum fjórðu bókina og foreldrabókina á donskum. Eisini er møguleiki at keypa fjórðu bókina á enskum.

Tvær av bókunum eru skrivaðar sum ein samtala millum eitt barn og annað av foreldrunum og skulu vera eitt høvi til, at foreldur tosa við børnini um kynsleiklutir og kynslív. Hetta er eisini høvuðstankin við hinum bókunum. Ætlanin er at foreldrini lesa foreldrabókina fyrst fyri at fáa íblástur til at hava hesar samrøður við síni børn.

Bøkurnar kosta í útsølu:

} 1: Søgan um meg (4-6 ár) / 50 kr.

} 2: Áðrenn eg varð til (6-9 ár) / 50 kr.

} 3: Hví so umráðandi? (9-12 ár)/ 120 kr.

} 4: Ansigt til ansigt med kendsgerningerne (12-16 år)/ 130 kr.

} 4. Facing the facts (12-16 ár)/ 130 kr.

} 5: Hvordan og hvornår fortæller du dine børn om sex/ 160 kr.

- Um allar bøkurnar verða keyptar saman kosta tær 400 kr !
(vika 5,6 og 7 tilboð)

Bøkurnar kunnu keypast í bókahandlinum Logos í Havn, hjá forlagnum Leirkerinum (leirkerid.fo) og hjá Heimamissiónsforlagnum (manna.fo). Bøkurnar 1 - 3 á donskum á www.scandinavia.as og á enskum á www.navpress.com. Eisini er møguligt hjá heimamissiónsforlagnum at fáa bøkur á donskum og enskum heim til tykkum. ( Leggið merki til, um netsølur bjóða tilboð í samband við flutningsgjald )

**Forlagið Leirkerið, Heimamissiónsforlagið og Føroyskar fríkirkjur.**

## *Eitt brot úr bókunum:* ***UM BÓKARØÐINA GUDS ÆTLAN VIÐ SEX***

Gud gav tykkum foreldur sexualitetin sum eina dýrabara gávu. Gud gav eisini børnum tykkara sexualitetin. Sexualiteturin frá Gudi til børn tykkara fer at vera ein kelda til bæði signing og gleði, um hendan gávan verður umsitin við ábyrgd.

Hvussu kunnu foreldur hjálpa til við hesum?

Tað eru nógvar kreftir, sum skunda undir børn tykkara til at taka vánaligar avgerðir á sexuella økinum. Longu frá yngstu árum verða børnini undirdíkt við niðurbrótandi og skeivum boðskapi um sexualitetin. Ígjøgnum tónleik, sjónvarp, internet, prát við vinfólk, sexualundirvísing í skúlanum og so framvegis. Úrslitið? Ein ørkymlandi vøkstur av leysasex, tannáringum, sum verða við barn, fosturtøkum, kynssjúkum, hjúnaskilnaðum og oyðiløgdum lívum.